## 15 vegir fingið navn

**Skopun:** Landsadressuskráin, sum Umhvørvisstovan umsitur, hevur nú góðkent veganøvn og húsanummur í Skopun, og sum bygdarráðið sjálvt hevur staðið fyri. Tey hava yvirhøvur brúkt nøvnini, ið hava verið, skrivar heimasíðan hjá Umhvørvisstovuni. Nú búgva eini 510 fólk í Skopun. Áðrenn kreppuna búðu 620 fólk her, men við kreppuni fór fólkatalið niður móti 400.



## Vøggustovan reist um 14 dagar

**Sandavágur:** Týsdagin varð betongdekkið lagt á grundina til nýggju vøggustovuni í Sandavági, skrivar Vágaportalurin. Tað er Sandavágs Timburhandil, sum hevur leverað betongdekkið, ið er gjørt í Danmark. Johnfinn á Plógv, byggimeistari, sigur við heimasíðuna hjá Sandavágs kommunu, at um einar 14 dagar verður bygningurin reistur.

# Nógvir arbeiðsdagar farnir fyri skeyti

**Eftir at hava verið nógv seinkaðir bæði av veðri og vindskaða, varð nýggi parturin av skúlanum á Fossánesi reistur týsdagin**

SKÚLI
*Snorri Brend*

**Fossánes:** - Teir hava verið nógv seinkaðir í arbeiðinum, men nú kemur av álvara gongd á aftur, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri í Hvannasunds kommunu.

Fyri meiri enn 20 árum síðani varð tann nýggi skúlin bygdur á Fossánesi, men nú trongdi hann til víðkan og nútíðargerð.

Hetta arbeiðið hevur staðið uppá eina tíð, men ein sannroynd hevur verið, at tað hevur viðrað sera illa til slíkt arbeiði henda seinasta veturin. Nógvir arbeiðsdagar eru tí farnir fyri skeyti.

Nógvur vindur og ólagaligt veður hava seinkað teimum munandi, og tað gjørdi ikki støðuna betri at sunnasti veggurin í útbygginingini datt niður í einum ódnarveðri herfyri.

Eftir at skaðin varð sýnaður, fóru teir undir aftur arbeiðið at gera útbyggingina av skúlanum lidna. Enn er kortini óvíst um, nær børnini í kommununi sleppa í henda nýggja partin.

- Eg kann í øllum førum siga, at á jólum er arbeiðið komið rættiliga langt. Eg vænti í øllum førum at tað verður liðugt, tá skúlarnir byrja aftur í 2009 – helst áðrenn, sigur borgarstjórin í Hvannasunds kommunu við Sosialin.

Skúlin á Fossánesi varð bygdur í 1985. Her ganga øll børnini í kommununi í skúla til og við 7. skúlaár. Skúlabørnini í framhaldsdeildini verða koyrd til skúlarnar í Klaksvík.



*Týsdagin varð nýggi parturin av skúlanum á Fossánesi reistur. Eftir ætlan verður arbeiðið liðugt um eitt ár ella so*

*Mynd: www.skulin.fo/fos*

# Hundalív í Sunda kommunu

**Í næstum fer Sunda kommuna undir eitt átak, soleiðis at borgararnir ikki longur verða plágaðir av leysgangandi djórum so sum hundum, gásum og øðrum djórum**

TRIVNAÐUR
*Snorri Brend*

**Sundalagið:** Umstøðurnar hjá leysgangandi djórum verða nú munandi skerdar í Sunda kommunu.

Hetta hendir eftir at fólk í kommununi í fleiri førum vent sær til kommununa og kært seg um hetta sama, tí tey hava trupulleikar við leysgangandi hundum, gásum og øðrum djórum.

Kommunan hevur tí tikið støðu til at fara í hernað ímóti leysgangandi hundunum, og hava gjørt eina avtalu við fútan um upptøku av slíkum djórum, eins vanligt er í øðrum kommunum.

- Komið er nú somikið ávegis við hesum ætlanum, at ein loysn kann væntast nú í vár, verður sagt úr Sunda kommunu.



*Skil skal fáast á leysgangandi djórum í Sundalagnum*

### Avhenda ella avlíva

Kommunan hevur í fyrstu syftu gjørt avtalu um eitt ansingarstað, har djórini verða tikin í varðveitslu, og har aktingarfólk tekur sær av teimum.

Mannagongdin verður annars hon, at borgarar kunnu boða løgregluni frá leysgangandi djórum, tá tey eru til ampa. Løgreglan gevur síðani boðini víðari til aktingarmannin, ið fer á staðið og tekur djórini í varðveitslu.

Eftir hetta vendir løgreglan sær til ánaran, um djór hava fyrisett spjaldur. Um ánarin ikki innan trý samdøgur hevur heintað djórið og goldið tey gjøld, ið standast av upptøkuni, verður djórið avhendað ella avlívað.

Tá talan er um djór, ið ikki hava nakað frámerki, lýsir løgreglan eftir ánaranum. Eisini í slíkum førum kann løgreglan avhenda ella avlíva djórið, um eigarin kunnað ikki hevur loyst tað móti at rinda gjøldini, sum eru knýtt at upptøkuni.

Sagt verður, at nærri verður kunnað um gjøld, varðveitslustað, avheinting og annað, so skjótt sum skipanin er sett í verk.

## Fokus á umsorgan fyri børn

**Klaksvík:** Fríggjadagin og leygardagin í hesi vikuni verða evnisdagar fyri teimum, sum starvast við børnum og ungum í Klaksvíkar Kommunu.

Evnisdagarnir verða skipaðir við fyrilestrum og kjaki, veit heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu at siga.

Tað er danski sálarfrøðingurin Inger Thormann saman við sosialu deild hjá Klaksvíkar Kommunu, sum skipa fyri evnisdøgunum.

Fríggjadagin verður dagurin hildin í skúlanum við Ósánna og er fyri tey, sum starvast í skúlunum, frítíðarskúlanum og Húsinum.

Evnið er "Umsorgan í mun til skúlabørn".

Leygardagin verður dagurin hildin í KFUM & K kl. 8.30 fyri starvsfólkunum innan dagstovnaøkið, dagrøktarum og Barnatænastuni. Evnið er "Børn og umsorgan".

**sb.**